## Skaddur liðformaður

Fleiri HB-viðhaldsfólk mundu stúra nakað, tá tað var greitt, at Rúni Nolsøe ikki var á liðnum móti NSÍ. Vanligi liðskiparin var skaddur, og í løtuni tykist tað nakað ivasamt, um hann verður tøkur til dystin komandi vikuskifti.

- Eg fekk ein lítlan skaða undir venjing mikukvøldið. Eg helt ikki, at tað var so álvarsamt, men tað hevur tað so víst seg at vera kortini, og tí var ikki hugsingur hjá mær at spæla hesaferð.

Ofta plaga skaðar av hesum slagnum at taka sína tíð at lekjast, men kortini, so vil Rúni ikki avskriva seg sjálvan til komandi uppgávuna hjá HB móti TB.

Nú fáa vit at síggja. Eg ætli mær at so at royna at venja í vikuni, og so má støða takast út frá tí. Men sum tað sá út í kvøld, so bilar tað nokk einki, at eg ikki eri við. Spælið í fyrra hálvleiki var í øllum førum nakað av tí besta, sum vit higartil hava víst, so kanska skal eg ikki skunda mær so heilt nógv at verða tøkur aftur, sigur HB-liðformaðurin at enda.

Fyri Rúna var Bárður Johannesen liðformaður.

-jm

## Hugalig HB-hagfrøði

Umframt at tey sjálvandi fegnaðust um sigurin á NSÍ, so hava HB-viðhaldsfólkini eina aðra heilt serliga orsøk at fegnast um, tá tosað verður um heimadystir móti NSÍ.

Verður hugt at úrslitunum seinastu tíggju árini, so hava hesi lagað seg so, at tá HB vinnur heimadystin móti NSÍ, gerast teir eisini føroyameistarar, meðan onnur fara avstað við gullinum, tá NSÍ fær nakað við sær úr Havnini.

Soleiðis spældu liðini javnt í Gundadali, tá GÍ í 1995 varð meistari. Gøtumenn vunnu eisini í ’96, tá NSÍ ikki var í bestu deildini, og tá B36 í 1997 vann gullið, fekk NSÍ eisini javnleik í Gundadali.

Í ’98 megnaði HB tó at vinna bæði NSÍ og gullmerki, men næstu trý árini vóru teir gulu ov drúgvir. Í 1999 og 2000 vann NSÍ, og tá gjørdust ávíkavist KÍ og VB meistarar. Í 2001 varð javnleikur úrslitið, og tá fóru grannarnir úr B36 aftur avstað við gullinum, men síðani hevur HB staðið fyri tí mesta. Í øllum førum hava meistaraheitini tey trý seinastu árini millum annað innihildið heimasigrar á NSÍ, og so man tað vera heilt hugaligt, at HB longu tvær ferðir í ár hevur vunnið heimadyst á NSÍ í landskappingini.

-jm

## Sálarlig blokering

Jens Martin Knudsen er vanliga ikki tann persónurin, sum hevur hug at fjala sannleikan, og tað gjørdi hann heldur ikki eftir tapið fyri HB.

– Vit spæla sum so slettis ikki so illa, men vit gera nøkur persónlig mistøk fyri steðgin, og so er tað fyri tað mesta mótbrekka hjá okkum.

Men mest av øllum, so helt Jens Martin, at talan eisini var um eitt slag av sálarliga blokering hjá NSÍ. Ein blokering, sum ofta hevur rakt liðið seinnu árini.

– Tú kanst siga, at teir saman um tikið vóru meira klárir til at fara fram í oddin, enn vit vóru. Vit hava jú í eini fimm ár verið nær oddinum, men vit hava enn ikki roynt at enda ovastir, og tað í sjálvum sær er blivið til eitt slag av eini forðing. Tú sært tað í einstøkum førum, at teir eru meira avgjørdir enn vit. Teir taka møguleikan, tá hann er har, ístaðin fyri at nøla tað allar minsta, og tað er so nakað, sum vit skulu til at vinna á. Tað er ein lutur, sum vit hava arbeitt støðugt við seinastu árini, og fyrr ella seinni, so ber væl eisini til at vinna á hesum, helt Jens Martin Knudsen at enda.

-jm

HB-NSÍ 3-1 (2-0):

# HB upp á oddases




**Sigurin á NSÍ gjørdist kanska tryggari, enn gestirnir hildu vera neyðugt, men tað nertir ikki við veruleikan, at HB nú er á odda í føroysku fótbóltskappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í sætta heimadystinum á árinum fekk HB fyri sættu ferð fulla úrtøku, tá NSÍ vitjaði mánakvøldið.

Tað var veruleikin, sum stóð eftir á talvuni, tá teir 90 minuttirnir í Gundadali vóru av, men í nógvar mátar mundu gestirnir kenna seg tiknar eitt sindur við nøsini, tí hóast teir í stórum pørtum av dystinum avgjørt vóru við til at mynda spælið, so kostaðu tvey mistøk stutt undan steðginum dýrt. Somikið dýrt, at runavíkinganir ongantíð av álvara vóru nøkur hóttan eftir hetta.

### Svenn avloysti Rúna

Fyrri hálvleikur var fyri tað nógva av tí undirhaldandi slagnum. Hóast uppgávan var trupul, so vóru runavíkingarnir á ongan hátt komnir til Havnar bara fyri at dyrgja eftir javnleikinum.

Tvørtur ímóti royndu teir frá fyrsta bríksli at leggja stórt trýst á HB. Á miðvøllinum vóru teir skjótir eftir bólthaldaranum, og tá ferð varð sett á niðaneftir, vóru báðir kantarnir ofta tiknir við, eins og tað eisini varð roynt við djúpum sendingum til Christian Høgna Jacobsen og Dánjal Hansen, sum vóru á toppinum.

Gestirnir mundu eisini kenna tað sum eitt pluss, at vanligi HB-liðformaðurin, Rúni Nolsøe, ikki fekk verið við, men hóast týdningurin av Rúna sjálvandi er stórur í HB, so prógvaði dysturin hesaferð, at maður væl kann koma í mans stað.

Svenn Dam Jacobsen hevur í ár veruliga at gera um seg á HB-liðnum, tá hann hevur verið innskiftur, og hesaferð fekk hann so møguleikan frá fyrsta bríksli. Hóast hann kanska ikki sær út av so nógvum, so prógvaði hann enn einaferð, at hann kropsliga væl kann fylgja við spælinum í bestu deildini. Og ikki minst kemur viðføðda spælskilið honum til góðar, tá avgerðir skulu takast nóg skjótt og væl.

At hann so eisini varð kosin til dagsins spælara av áskoðarunum mundi ikki gera dagin verri fyri hansara viðkomandi, og tað er ikki sørt hugtakandi at staðfesta, hvussu ungi spælarin er komin úr mest sum ongum og hevur yvirhála fleiri av annars evnaríku spælarunum, sum annars tóktust hava pláss frammarligari í røðini, tá tosað hevur verið um væntandi gjøgnumbrot í HB hetta árið.

Saman við Kára Nielsen var Svenn soleiðis snúningspunktið hjá HB, og hóast gestirnir trýstu, so dugdu teir í HB eisini sítt. Ikki minst gav tað runavíkingunum trupulleikar, tá bóltar vórðu sendir djúpt oman í síðurnar, har Jákup á Borg og Tór-Ingar Akselsen høvdu til uppgávu at renna hesar upp. Tað gjørdu teir ofta, og var tað ikki fyri Einar Hansen og Brynjólv Nielsen á bakkunum, kundu vandastøðurnar helst verið enn fleiri, enn talan var um.

### Verjumistøkini

Hóast smærri og størri møguleikar til bæði liðini, so bendi nógv á, at fyrri hálvleikur skuldi gerast málleysur. Skal tosast um møguleikar, so var NSÍ helst verið liðið, sum hevði verið nærri við, men eftir fáum minuttum vóru allar vónirnar hjá teimum mest sum skotnar í senk.

Fyrst fekk HB lagt seg á odda eftir uppspæl í høgru. Miðverjan mistók seg dyggiliga, tá roynt varð at snitta bóltin burtur, heldur enn stúta bóltin beint útaftur. Rókur royndi seg við skoti, men tá hetta heilkiksaði, stóð Hans á Lag brádliga púra blankur, og verjuskansin, sum aftur hendan dagin var í álopinum, var ísakaldur, tá møguleikin beyðst.

Og lítla løtu seinni var aftur galið. NSÍ hevði ann-